| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>8. juni 2006 | Blað nr.: 6617 |
| --- | --- |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **8. juni 2006**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **109/06-115/06**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Bjørgfríð Ludvig
Ingibjørg Berg
Randi Frederiksberg

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Tórgerð Hentze

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**109/06** **<u>2006-0221</u>**

**<u>Mál beind í nevndir</u>.**

**Býráðið 8. juni 2006:** Tikið til eftirtektar.

**110/06** **<u>1999-0606</u>**

**<u>Skipanarætlan fyri rennibreytina</u>**.

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Býarskipanardeildin hevur, vísandi til mentamálanevndarsamtyktina dagfest 24. juni 2003, og samtyktina í byggi-og býarskipannevndini j. nr. 9902090-1, gjørt skipanarætlan fyri økið á Hálsi har ein rennibreyt er staðsett.

Uppskotið skipar økið við einari rennibreyt við 8 geirum og einum fótbóltsvølli inni í miðjuni.

Øki er lagt av til parkering og møguligar bygging til virksemið.

Skipanarætlanin leggur upp til at ásetingarnar fyri fyri økið skulu broytast frá at vera C2 - opin miðstaðarbygging til at verða D2 ítróttarøki fyri tað økið har rennibreyting liggur.

Ætlanin hevur eisini við sær, at onnur vegatgongd skal finnast til matr.nr. 1394 – sethús og grundstykki og matr.nr. 1408 b og 1408 c – ogn hjá Føroya Tele (dagstovnurin KURLAN).

Ein slík rennibreyt við einum fótbóltsvølli í miðjuni hevði verið eitt skilagott uppískoyti til Gundadal og á Hálsi sum ítrottarøkið.

Hjálagt er uppskot til skipanarætlan j. nr. 200202698-4

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin í mentamálum mælir til at arbeitt verður víðari við málinum, og at ein byggiskrá verður gjørd fyri verkætlanina.

**Mentamálanevndin 21. apríl 2004:** Samtykt at arbeiðssetningurin verður soljóðandi:

**Arbeiðssetningur**
Arbeiðsbólkur verður settur at gera eina byggiskrá til ger av rennubreyt við tilhoyrandi økjum og útgerð í Tórshavnar kommunu.

**Byggiskráin skal m.a. innihalda:**
- Skipanarætlan fyri økið á Hálsi, sambært j. nr. 9902090-1, sum plandeildin hevur gjørt, herundir:
  - Stødd, plasering o.a.
  - Uttanduraøki
  - Hølisskrá
  - Atkomuviðurskifti
  - Útbyggingarmøguleikar
- Ognarviðurskifti
- Tíðarætlan
- Leiðbeinandi kostnaðarmeting, býtt sundir í:
  - Undirlendisarbeiðið
  - Breyt við 8 geirum
  - Miðøki við einum fótbóltsvølli
  - Uttanumøki, atkoma, parkering og møguligar bygging til ymiskt virksemið, t.d. gistingarhús.
  - Møguliga atkoma til verandi stadionøki

Bólkurin eigur eisini at hava fyrilit fyri myndugleikakrøvum og øðrum viðurskiftum, soleiðis at hesi verða lýst, nevnast kann m.a.:

<u>at</u> byggisamtyktini skal broytast frá at vera C2 – opin miðstaðarbygging til at verða D2 ítróttarøki.
<u>at</u> kommunan má ogna sær uml. 4000 $m^2$ frá matr.nr. 1393.
<u>at</u> vegatgongd til grannaognir skulu fáast upp á pláss.

Byggiskráin skal leggjast fyri mentamálanevndina í seinasta lagi 30. juni 2004.

Eisini samtykt at arbeiðsbólkurin hevur 3 limir:

1 umboð fyri Trivnaðarfyrisitingina, sum verður formaður
1 umboð fyri Teknisku fyrisitingina og
1 umboð fyri Sersamband fyri frælsan ítrótt

og at játta kr. 200.000 av konto 64 til byggiskránna.

**Mentamálanevndin 30. juni 2004:** Málið varð lagt fram og verður arbeitt víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur eftir summarfrítíðina.

**Mentamálanevndin 7. september 2004:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Avgerandi fortreyt fyri at økið kann brúkast til rennibreyt, er at broyting verður gjørd í byggisamtyktini, har økið verður broytt frá C2-opin miðstaðarbygging til at verða D2, ítróttarøki.

Serstøk byggisamtykt er fyri lítlan part av økinum, sum er kannaður traðarbrúki og velt lendi. Men við atliti til, at talan er um so lítlan part av verkætlanini sum verður umfataður av hesum, og vísandi til at aðrir vegir eru lagdir í økinum undir somu ásetingum, metir býararkitekturin ikki at hetta kann hava við sær at neyðugt verður at broyta serstøku byggisamtyktina.

**Tilmæli:**
Vísandi til samtykt 22. mars 2004, tá byggi- og býarskipanarnevndin góðkendi skipanarætlan fyri økið, soleiðis at arbeiðast kundi víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur. Býararkitekturin mælir til at nevndin tekur undir við ætlanini, so at farast kann undir at broyta byggisamtyktina fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við ætlanini, og at mæla býráðnum til at broyta byggisamtyktina sambært kortskjali 1999-0606/32, dagfest 13. juni 2005, frá C2 øki til D2 øki.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna byggiskránna, dagfest 14. juni 2005, og at játta peningin, kr. 700.000,00, ið er tøkur á konto 64, til projektering

**Mentamálanevndin 14. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at bjóða arbeiðið út.

**Mentamálanevndin 8. mars 2006:** Býararkitekturin greiddi frá málinum, sum verður viðgjørt á einum seinni fundi í mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 4. apríl 2006:** Útsett.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur kannað møguleikar fyri endaliga staðseting og skipan av rennibreytini og vil grunda á lýsinda tilfar, ið er fingið tilvega, mæla til, at farið verður undir at gera eina rennibreyt á Hálsi. Sí kortskjal nr. 19990606 dagfest. 19.05.2006.

Hjálagt er eisini kostnaðarmeting uppá verkætlanina og verður heitt á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, at útvega neyðuga pening til verkætlanina.

Vísandi til avgerð í bygginenvndini um skipan av arbeiðinum, mælir nevndin víðari til, at tikið verður av innkomna undirhondsboð uppá arbeiðið at grava oman av á økinum. Hjálagt eru tvey innkomin undirhondsboð.

Vísandi til mannagongd fyri bygging/verkætlanir í Tórshavnar kommunu, mælir bygginevndin víðari til at senda málið til ummælis í hinum faknevndunum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Tvey tilboð eru innkomin:

Karl Patursson kr. 1.189.050,00
Robert Brockiekr. 1.565.483,00

Mentamálanevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá Maskinkoyring við Karl Patursson kr. 1.189.050,00.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 31. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Støðuplanur av verkætlanini hevur verið viðgjørdur í teknisku umsitingini.

Eftir sum einki ítøkiligt tekniskt projekt fyriliggur í løtuni, verður greitt frá verkætlanini og hvørji atlit eiga at verða tikin í sambandi við ymsum tekniskum viðurskiftum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at arbeitt verður víðari við projektering av verkætlanini.

**Tekniska nevnd 1. juni 2006:** Nevndin mælir til, at verkætlanin eisini fevnir um betri atkomuviðurskifti frá Sundsvegnum og eina tryggari gonguleið til Gundadalsøkið umframt tekniskar veitingar so sum kloakk, vatn, ljós o.a. at leggja fyri nevndina aftur.

**Býráðið 8. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**111/06** **2006-1340**

**Rakstur og íløgur í smábátahavnir í Tórshavnar kommunu.**

Tórshavnar havn hevur umsitið, viðlíkahildið og gjørt íløgur í smábátahavnirnar í Tórshavnar kommunu.

Tá Tórshavnar kommuna bert var Tórshavn, vóru bátarnir ein partur av sjálvari havnini, men hetta er broytt munandi við kommunusamanleggingunum seinnu árini.

Við teirri seinastu samanleggingini eru tað tilsamans 13 ymiskir bátahylar/lendingar.

Hetta hevur viðført, at tað er blivið munandi dýrari í rakstri, soleiðis at inntøkur og rakstrarútreiðslur av bátahylum/-lendingum hanga ikki saman.

Á teimum ymisku plássunum eru tað ynski um fleiri ábøtur, og tá eftirspurningurin eftir bátaplássum er stórur, verður tørvur á íløgum í nýggj bátapláss kanska aktuellur um ikki so langa tíð

Í løtuni eru tað 570 bátar, sum gjalda kr. 700.000,00 í bátagjaldi um árið.

Tær árligu útreiðslurnar til viðlíkahald, umsjón, og el eru umleið 1,1 mió. Her er ikki íroknað avskrivingar av íløgum til bátahavnir.

Miðað hevur verið eftir, at útreiðslur og inntøkur hjá Tórshavnar havn skulu javnviga.

Sum støðan er nú, og við framtíðini í huga, má støða takast til, hvussu undirskotið av smábátum/lendingum skal fíggjast í framtíðini.

**Havnanevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at heita á umsitingina um at gera uppskot til hækkan av bátagjøldunum.

**Ískoyti:**
Galdandi takstir fyri bátalegu í Tórshavnar kommunu eru:

| **Slag** | **Um árið** | **Vegleiðandi breidd í cm** |
|---|---|---|
| Fýramannafar og minni | 687,50 | 160 - 199 |
| Seksmannafar | 1.125,00 | 200 - 229 |
| Áttamannafar | 1.650,00 | 230 - 259 |
| Tíggjumannafar | 1.850,00 | 260 - 289 |
| Seksæringur og størri | 2.250,00 | 290 og breiðari |

Í takstinar er íroknað MVG
Talið á størri bátum veksur lutfalsliga skjótt, og talið á bátum omanfyri 290 cm er nógv vaksið.

Gjaldið fyri bátar omanfyri 290 cm er lutfalsliga lítið, tí tað eru nógvir bátar, sum eru langt oman fyri 290 cm, men gjalda ikki meira enn hægsta gjald. Hesir bátar krevja eisini nógv størri og sterkari teymar/bátabummar enn teir smærru.

Seinast gjøldini hækkaðu var í 1990.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at gera fleiri bólkar og at hækka takstirnar lutfalsliga í mun til breiddina.

| **Slag** | **Breidd í cm** | **Um árið** |
|---|---|---|
| Fýramf. og minni | 160 - 199 | 875,00 |
| Seksmf. | 200 - 229 | 1.562,50 |
| Áttamf. | 230 - 259 | 2.250,00 |
| Tíggjumf. | 260 - 289 | 2.937,50 |
| Bátur | 290 - 319 | 3.625,00 |
| Bátur | 320 - 349 | 4.312,50 |
| Bátur | 350 - 379 | 5.000,00 |
| Bátur | 380 og størri | 5.687,50 |

Í takstunum er íroknað mvg, sum teir vinnurekandi fáa afturgoldið.

Í meðal gevur hetta eina hækking uppá 50% í inntøkunum upp á bátagjøld.

**Havnanevndin 29. mai 2006:** Ein meiriluti: Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal og Annika Olsen, mælir býráðnum til, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum frá havnameistaranum.

Hækkingin av bátagjøldunum skal koma í gildi 1. juli 2006 og endurskoðast um eitt ár.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir frá at hækka gjøldini.

**Fíggjarnevndin 31. mai 2006:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Jan Christiansen og Marin K. Frýdal, mælir býráðnum til at taka undir við meirilutanum í havnanevndini.

Høgni Mikkelsen vísir til støðu sína í havnanevndini.

**Býráðið 8. juni 2006:** Fyrst var atkvøtt um at beina málið aftur í havnanevndina, sum fall við 7 atkvøðum ímóti og 6 fyri.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen

Síðani var atkvøtt um broytingaruppskotið frá Jan Christiansen um at senda málið til ummælis hjá bátafeløgunum í kommununi, áðrenn býráðið tekur støðu, sum sum fall við 7 atkvøðum ímóti og 6 fyri.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

At enda var atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov og Annika Olsen.

Ímóti atkvøddu: Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

Katrin Dahl Jakobsen fór av fundi

**112/06** **2005-1590**

**Keyp av fjøruni í Kollafirði**

Tað hevur verið siðvenja, at kommunan ognar sær fjøruna á staðnum. Hetta hevur verið gjørt fyri at kunna tryggja almenninginum rætt til fjøruna, og fyri at tryggja sær atgongd til sjógvin.

Øll fjøran í Kollafirði er ogn hjá samlaða markatalinum, uttan tað sum kommuna longu hevur keypt í sambandi við havnaútbyggingar, og tað sum bara jarðarráðið eigur.

Øll fjørðan, sum hoyrir til samlaða markatalið frá Kjalnesi til út á Sperm, er 31.169 $m^2$.

Fjøran, sum jarðarráðið eigur einsamalt, er 1.862 $m^2$.

Fjøran framman fyri tað lendið, sum í byggisamtyktini er avlagt til neystagrundir, er tilsamans 7.300 $m^2$.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at kommunan ognar sær fjøruna, sum í byggisamtyktini er avlagt til neystagrundir upp á tilsamans umleið 7.300 $m^2$.

Eisini verður mælt til, at kommunan fær optión frá eigarunum upp á restina av fjøruni upp á tilsamans umleið 25.731 $m^2$.

**Havnanevndin 13. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í kollfjarðarnevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið til ummælis og avgreiðslu.

**Kollfjarðarnevndin 15. mai 2006:** Nevndin mælir til at taka undir við havnanevndini og beinir málið víðari í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið til ummælis og avgreiðslu.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka undir við havnanevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá havnameistaranum.

**Fíggjarnevndin 31. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini.

**Býráðið 8. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

113/06 2006-0475

Víðkan av byggisamtyktini fyri havnaøkið á Langasandi í Kollafirði.

Vinnufyritøkur hava víst nýggja havnaøkinum á Langasandi stóran áhuga.

Havnaøkið er um at vera fult útbygt, soleiðis at plássið hjá verandi fyritøkum at vaksa um virksemið er avmarkað, og einki øki er tøkt til nýggjar vinnu-møguleikar.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at mæla býráðnum, um byggi-og býarskipanarnevndina, at víðka byggisamtyktina fyri havnaøkið, soleiðis at fyllast kann meira út eystur frá verandi havnaøki sambært kortið nr. 1, dagfest 6. februar 2006.

**Havnanevndin 13. februar 2006:** Samtykt at beina málið í kollfjarðarnevndina.

**Kollfjarðarnevndin 15. mai 2006:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá havnameistaranum og beinir málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at byggisamtyktin verður broytt sambært hjálagda kortskjali.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 8. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

114/06 2005-2853

Viðvíkjandi sundurbýti av matr. nr. 735, Tórshavn.

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
9. september í 1992 søkti eigarin av matr. nr. 735, Tórshavn, Johanna J. Bærentsen, um at býta matr. nr. 735, Tórshavn, í 4 grundstykki, og at byggisamtyktin fyri økið var broytt frá D1 øki (almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál) til A1 sethúsaøki.

Ognin matr. nr. 735, Tórshavn, er 3.088 m² til støddar.

Málið var viðgjørt av byggi- og býarskipanarnevndin tann 12. oktober 1992. Nevndin samtykti at ganga umsóknini á møti at góðkenna broyting í alm.

byggisamtyktini og samsv. broyting í serstøku byggisamtykt nr. 3, soleiðis at matr. nr. 735 verður A1-øki (sethúsaøki). Hetta bleiv samtykt av býráðnum tann 29. oktober 1992.

Broytingaruppskotið lág frammi í tíðarskeiðnum 15. mars til og við 2. apríl 1993 og seinasta freist at mótmæla broytingini var 15. juni 1993.

Eitt mótmæli kom frá eigaranum av matr. nr. 724h. Hesin mótmælti, at ein partur av hansara ogn skuldi nýtast til innkoyring til matr. nr. 735.

Síðani er tað hent, at 724h er selt og marknaskifti gjørt, soleiðis at vegur nú er frábýttur av matr. nr. 724h, Tórshavn.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at taka málið uppaftur og arbeiða víðari við málinum um broytingina av byggisamtykt og sundurbýti av ognini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2006**: Meðan hetta mál var viðgjørt, fór Jan Christiansen av fundi.

Nevndin vísir á, at býráðið einmælt hevur samtykt broytingina 29. oktober 1992 og tekur undir við tilmælinum frá býararkitektinum.

**Býráðið 8. juni 2006:** Meðan hetta mál var viðgjørt, fór Jan Christiansen av fundi.

Fyrst var atkvøtt um uppskot frá Marini Katrinu Frýdal um at beina málið aftur í nevnd, sum fall við 6 atkvøðum ímóti og 4 atkvøðum fyri.

Ímóti atkvøddu: Leivur Hansen, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov.

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge.

Síðani var atkvøtt um at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum og byggi- og býarskipanarnevndini um at arbeiða víðari við málinum og senda málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkel-sen.

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, tí at málið var ov illa lýst.

Greiddi ikki atkvøðu: Hildur Eyðunsdóttir, tí at málið var ov illa lýst.

**115/06** **2005-1092**

**Byggilendi í Kollafirði.**

**Kollfjarðarnevndin 19. apríl 2005:** Nevndin vísir á, at tørvur er á áleið 30 sethúsastykkjum í Kollafirði.

Semja er um at biðja býarverkfrøðingin/býararkitektin koma við hugskoti til, hvar útstykkjast kann til næsta fund.

**Kollfjarðarnevndin 23. mai 2005:** Kári Finsson møtti fyri byggideildina og vísti á ymiskar møguleikar fyri sethúsastykkjum.

Nevndin heitir á kommununa um at útvega áleið 50 sethúsastykki í Kollafirði.

**Ískoyti:**
Vísandi til at tað er eitt stórt arbeiði at gera eina útstykking við 50 grundøkjum og kann taka rættiliga drúgva tíð, áðrenn nøkur hús verða bygd eftir einari slíkari ætlan, metir umsitingin, at tað er rættast at fara í gongd við nakrar smærri ætlanir fyri at loysa bráðneyðuga tørvin, ímeðan arbeitt verður við eini størri útstykking.

Umsitingin hevur hugt eftir økjum, sum er ogn hjá antin Jarðarráðnum ella privatum, sum eru áhugað í eini møguligari útstykking.

Onnur øki eru eisini í Kollafirði, bæði smærri og størri, men hesir eigarar eru ikki spurdir um teirra ætlanir fyri øki teirra.

Við teimum økjum, sum umsitingin metir verða væl egnað til útstykking í fyrstu atløgu, verða tilsamans eini 22 nýggj grundstykki. Hesi grundstykk eru býtt í fýra smærri útstykkingar.

1. Útstykkingin nakað norðari og oman fyri Lygnnes (uml. 3 grundstykki) er ogn hjá kommununi og hevur bert smærri tillagingar av fríøkinum við sær.

2. Útstykkingin oman fyri Lygnnes (uml. 8 grundstykki) er treytað av, at eigararnir eru fyri eini útstykking. Kommunan hevur óformelt tosað við onkran av eigarunum og var ein positivur hugburður fyri eini møguligari útstykking. Eigararnir hava tó ikki enn sæð nakra endaliga útstykkingarætlan fyri økið, og skal hetta tí takast við stórum fyrivarni.

3. Útstykkingin undir Homrum (uml. 5 grundstykki) liggur í løtuni hjá Jarðarráðnum til viðgerðar.

4. Útstykkingin við Kjalnes (uml. 6 grundstykki) krevur eina broyting í byggisamtyktini.

Viðlagt eru 5 kortskjøl, sum vísa á omanfyri nevndu útstykkingar og teirra staðseting í bygdini.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at umsitingin arbeiðir víðari við omanfyri nevndu ætlanum fyri framtíðar búsetingum í Kollafirði. Býararkitekturin mælir til, at nevndin samtykkir, at tekniska umsitingin fær tey fyrstu uml. 22 grundstykki, sum býarskipanardeildin hevur víst á, at arbeiða víðari við.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at kunna kollfjarðanevdnina um hetta arbeiði.

**Kollfjarðarnevndin 12. september 2005:** Nevndin mælir til at taka undir við býararkitektinum.

**Ískoyti:**
Uppskot kemur frá teknisku umsitingini, um hvar ein størri útstykking kann fara fram, og við uppskoti til broyting av byggisamtyktini í sambandi við hetta.

**Kollfjarðarnevndin 21. november 2005:** Kollfjarðarnevndin tekur undir við omanfyristandandi og vísir á, at møguleikar eru eisini fyri útstykking norður í Sundum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at byggi- og býarskipanarnevndin á fundi 7. november 2005 samtykti at broyta byggisamtyktina fyri eitt grundøki á Kjalnesi (mál nr. 2002-1350, Jóan Jakku Joensen) metir umsitingin, at tað er rætt at broyta eitt størri øki, soleiðis at tað verður pláss fyri 6 grundøkjum her.

Hetta er ein av teimum smærri útstykkingjunum, sum byggi- og býarskipanar-nevndin á fundi 13. juni 2005 samtykti, at umsitingin skuldi arbeiða víðari við. Í heildarætlanini fyri Kollafjørð er hetta lagt út sum A3-øki.

Arbeitt verður eisini víðari við eini størri útstykking í hesum økinum.

Eisini hevur umsitingin hugt eftir einum øki norðuri í Sundunum, har pláss er fyri uml. 12 grundøkjum. Hetta øki eru 2 traðir, sum Føroya Jarðargrunnur eigur.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt sambært hjáløgdum kortskjali, og at arbeitt verður víðari við økinum norðuri í Sundunum sum er byggilendi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Kollfjarðarnevndin 30. januar 2006:** Kollfjarðarnevndin mælir til at taka undir við uppskoti til útstykking norður í Sundum, sbrt. kortskjali, ”útstykking norði í sundi, 30. januar 2006.”

Kollfjarðarnevndin mælir eisini til, at farið verður víðari við útstykkingini móti Kjalnesi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. februar 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Freistin at mótmæla broytingina av byggisamtyktini fyri Kollafjørð við Kjalnes er nú farin.

Kommunan hevur móttikið eitt mótmæli frá Eddie H Joensen, bóndi á Kjalnesi.

Hann mótmælir, at kommunan tekur bøin bita fyri bita, í staðin fyri at TK og bóndin koma ásamt um eina avtalu, sum báðir partar kunnu liva við.

Í hesum sambandi hevur leiðslan havt ein fund við Eddie H Joensen um møguligar framtíðar loysnir.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at halda fast við ætlaðu broytingina, og at arbeiðið við at finna eina framtíðar loysn við Eddie H Joensen heldur fram.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 8. juni 2006:** Málið tikið av skrá.

**FUNDUR LOKIN KL. 19.35**

## GERÐABÓKIN GÓÐKEND:

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |